## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Um morgunin stívt andøvsgul av útsynningi og turt, men sum fráliður hvassur vindur av suðri og regn. Seint um kvøldið minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið ella storm av landsynningi og regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin skrið ella stormur av útsynningi, men seinnapartin og týsdagin minni vindur av vestri. Ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

60 ára framsýning:

# Amariel í Galerie Focus

LISTAFRAMSÝNING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú kendi føroyski listamálarin Amariel Norðoy fyllur 60 ár letur upp framsýning í Galerie Focus leygardagin kl. 16. Har verða 20 nýggir og einstakir eldri málningar og hevur listamaðurin valt at kalla hesa sína framsýning á 60 ára føðingardegnum "Útróðrarbørn", eitt heiti, sum nettupp lýsir og er reyði tráðurin í málningalistini hjá hesum dámliga og positiva listamanni.

Tað er serstakliga motorbáturin "Norðan", sum varð bygdur í 1919 í Rættará og sum varð partur av uppvøkstrinum hjá listamanninum, ið gongur aftur í málningunum, ið verða vístir fram føðingardagin. Amariel heldur fram við at mála bláu litirnar eisini á 60 ára degnum. Motorbáturin og blái tónin eru afturvendandi í listini hjá Amariel.

Hann hevur ikki talið á øllum framsýningunum hann hevur hildið hesi 60 árini. Men tað er høgt. Fyrsta framsýningin varð á Norðoyarstevnu í 1967. Í meira enn 30 ár hevur Amariel víst fram málningar sínum á framsýningum í Føroyum og í Danmark, oftani einsamallur og oftani saman við øðrum.

Í sambandi við at Amariel fyllur 60 ár leygardagin er almenn móttøka í Lambagerði 1 frá klokkan 10 til 14. Aftaná er so fernisering í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20. Hon er opin frá kl. 16 til 18.



*Amariel Norðoy er "still going strong" . Nú letur hann upp framsýning á 60 ára føðingardegnum*

*Mynd Jens K Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 14 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 18 |
| Athen | -- |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 22 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 30 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 975 hPa. eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður við Føroyar fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað. Brúgvalagið við Føroyar stendur í stað, men fer væntandi eystureftir leygarnáttina.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 5/10 kl. $06^{00}$– 6/10. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,0°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 20,0 mm – mált frá 5/10 kl. $06^{00}$– 6/10 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í oktober: 50,1 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 28. september | Mánin longst frá jørðini |
| 3. oktober | Tendring |
| 10. oktober | Fyrra kvarter |
| 14. oktober | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Okt. | 09.55 | 22.19 | 08.55 | 21.19 | 09.10 | 21.34 | 11.55 | - | 00.31 | 12.55 |
| 8. Okt. | 10.46 | 23.14 | 09.46 | 22.14 | 10.01 | 22.29 | 00.19 | 12.46 | 01.19 | 13.46 |
| 9. Okt. | 11.41 | - | 10.41 | 23.09 | 10.56 | 23.24 | 01.14 | 13.41 | 02.14 | 14.41 |
| 10. Okt. | 00.09 | 12.50 | 11.50 | - | - | 12.05 | 02.09 | 14.50 | 03.09 | 15.50 |
| 11. Okt. | 01.31 | 14.12 | 00.31 | 13.12 | 00.46 | 13.27 | 03.31 | 16.12 | 04.31 | 17.12 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Okt. | 08.10 | 20.34 | 07.10 | 19.34 | 10.10 | 22.34 | 11.10 | 23.34 | 09.40 | 22.04 | 10.55 | 23.19 |
| 8. Okt. | 09.01 | 21.29 | 08.01 | 20.29 | 11.01 | 23.29 | - | 12.01 | 10.31 | 22.59 | 11.46 | - |
| 9. Okt. | 09.56 | 22.24 | 08.56 | 21.24 | 11.56 | - | 00.29 | 12.56 | 11.26 | 23.54 | 00.14 | 12.41 |
| 10. Okt. | 11.05 | 23.46 | 10.05 | 22.46 | 00.24 | 13.05 | 01.24 | 14.05 | - | 12.35 | 01.00 | 13.50 |
| 11. Okt. | - | 12.27 | 11.27 | - | 01.46 | 14.27 | 02.46 | 15.27 | 01.16 | 13.57 | 02.31 | 15.12 |

5 707265 100050 >